# HB gjørdi bart í piltadeildini



*HB-piltar eru føroyameistarar (HBa framman) og silvurvinnarar (HBb aftan). Myndin er tikin í Hvalba aftaná seinasta umfarið leygardagin. Aftasta rað frá vinstru: David Sømark, Símun Johannesen, Gestur Dam, Bárður Guttesen, Magnus Berg Lund, Kristian Thostrup, Hørður Askham, Kjartan Nielsen, Dávid Nolsøe. Miðrað frá vinstru: Lávus Djurhuus, Hans Jakobsen, Jóhan á Plógv, Bogi Berg, Eirikur Simonsen, Kári Hvannastein, Andrias Høgnason Eriksen, Ári Mohr Danielsen, Magnus Egilsson. Fremst frá vinstru: Jens Ingolv Holm (A) og Eli Nolsøe Leifsson (B). Á myndini vantar Tóki S. Nolsøe. Venjarar vóru Høgni Eriksen og Heðin Askham*

*Mynd: www.hb.fo*

**Piltadeildin leikti á fyrsta sinni bert á hálvum vølli, og her tók HB sær av bæði fyrsta og øðrum plássi. HBa megnaði enntá at leika alt kappingarárið uttan at tapa ein dyst**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyrstu ferð nakrantíð hevði føroyska fótbóltssambandið valt, at piltadeildina skuldi spæla á hálvum vølli. Meistarabólkurin hjá piltunum hevur altíð leikt á heilum vølli, men í ár valdi fótbóltssambandið royna nakað nýtt, sigur Niklas á Líðarenda, formaður í ungdómsnevndini hjá fótbóltssambandinum.

- Grundin til, at vit valdu at fara niður á hálvan vøll í piltadeildini, er heilt einføld. Vit meta ein heilan vøll vera ov stóran fyri so ung børn. Hartil hevur tað eisini stóran týdning hjá børnum, at tey hava nógvar bóltrøringar, tí hetta hækkar tekniska støðið.

- Tá ið liðini spældu heilan vøll, so vísti tað seg ofta, at nakrir av leikarunum høvdu alt ov fáar bóltrøringar, og hetta hava vit valt at gera nakað við, soleiðis at allir leikararnir á vøllinum nú sleppa at hava fleiri bóltrøringar.

Niklas heldur eisini, at kappingin sum heild hevur lagað seg væl, men hann ásannar, at onkrir smáir trupulleikar komu til sjóndar við nýggju skipanini.

- Kappingin hevur gingið ómetaliga væl, og eg haldi, at fólk kring landið eru glað fyri, at piltarnir eru farnir niður í hálvan vøll. Tað var tó ein lítil trupulleiki, tá vit skuldu styrkismeta liðini. Vit vistu ikki, hvørji lið vóru sterk, og hvørji vóru minni sterk. Hetta vísti seg tó at gerast ein lítil trupulleiki, tí styrkismetanin var á eini góðari leið.

### HB í serflokki

Piltadeildin varð skipað á tann hátt, at fýra ella fimm lið vóru í innleiðandi bólkunum, sum vóru níggju í tali. Tvey tey bestu liðini úr hvørjum bólki komu so víðari í ein hálvfinalubólk, har besta og næstbesta liðið komu víðari í meistarabólkin. Liðini, sum ikki komu víðari, fóru í ein annan bólk, soleiðis at veikaru liðini eisini sluppu at møta liðum á sama støði.



*TB vann bronsu í piltadeildini. Aftan frá vinstru: Milan Cimburovic,venjari, Friði Strøm, Martin Petersen, Mathias Mortensen, Rasmus Potts og Pol Ingason Framman frá vinstru: Hjalti Vestergaard, Eirikur Magnusson, Margeir Kjærbo, Heine Mortensen, Teitur Olsen og Patrick Johannesen*

*Mynd: Áki Bertholdsen*



*AB piltar. Aftan frá vinstru: Terji Hansen, venjari, Karsten Højgaard, Hjalti Bachmann, Grímur Petersen, Andrias Arge, Gert Drangastein og Kristin Andersen. Framman frá vinstru: Gunnar Thomsen, Bjørn Mohr, Pól Dulavík, Ólavur Venned og Jan Johannesen*

*Mynd: Áki Bertholdsen*